

*Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í Almannamálum, helt eisini røðu*

# Sambýli til ung við sálar-trupulleikum

**Fríggjadagin var móttøka í nýggja sambýlinum við Heyggjar. Sambýlið er ætlað ungum fólkum, sum hava tað trupult sálarliga. Pláss er fyri fimm búfólkum, men tørvurin er so stórur, at tað búgva seks fólk inni har, nú sambýlið letur upp**

SAMBÝLI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sjálvandi var landsstýriskvinnan í almannamálum, Rósa Samuelsen við til móttøkuna við Heyggjar fríggjadagin, og hon segði eisini nøkur orð

- Eg vil sum landsstýriskvinna í Almannamálum ynskja tykkum búfólkum og starvsfólkum hjartaliga tillukku við hesum stásiliga sambýlið, segði Rósa Samuelsen.

Og henni líktist eisini væl á umstøðurnar.

- Nú havi eg hugt eitt sindur runt her inni og tað er ótrúliga hugaligt at síggja umstøðurnar. Alt tykist vera hugsa út í æsir, og tað er týðuligt, at tit búfólk og starvsfólk hava verið við at seta dám á, segði Rósa Samuelsen.

Sjálv hevur hon fylgt við, nú sambýlið hevur verið gjørt í stand.

- Frá síðulinjuni havi eg verið so heppin at kunna fylgt við sambýlinum við Heyggjar og má siga at tað er sera hugnaligt og heimligt. Í dag bjóða vit eitt munagott og mennandi tilboð fyri ung, sum hava tað trupult sálarliga, segði Rósa Samuelsen.



*Gestir, starvsfólk og búfólk lurta eftir røðuni hjá Sjúrða Johannesen*

## Støði í tí einstaka

- Og tað er í veruleikanum tykkum, ið vit fagna í dag. Eg veit, at fleiri av búfólkunum hava verið í einari rívandi menning, síðan tit komu her. Onnur høvdu ongantíð havt møguleikan at komi heim til Føroyar, um ikki tit høvdu hetta tilboðið at koma heim til, og ikki minst, har støði verður tikið í tí einstaka, segði Rósa Samuelsen.



*Lillian Sjúrðardóttir Johansen sang og Sámal Lindenskov spældi undir til móttøkuna*

Hon heldur, at hetta er eitt gott stig á rættari leið.

- Hetta rakar beint í mítt hjarta. Tað er eitt mál fyri mær sum landsstýriskvinna, at fáa skipað soleiðis fyri, at vit í framtíðini ikki senda børn og ung uttanlands, tí vit ikki hava pláss fyri teimum her, segði Rósa Samuelsen.

Hon heldur at tað er umráðandi, at vit gera alt fyri at seta inn fyri at hava okkara børn og ung heima í Føroyum, og skapa umstøður fyri tey, har støði verður tikið í tí einstaka.

- Vit skulu heilt einkult hava pláss fyri øllum í Føroyum. So rúmligt eigur okkara samfelag sjálvandi at vera, segði Rósa Samuelsen.

## Nærløgd starvsfólk

- Tit starvsfólk hava stórt rós uppiborið fyri tykkara virkna leiklut í arbeiðinum at fáa hettar heim upp at koyra. Tykkara arbeiðið er á nógvar mátar slóðbrótandi og tit kunnu vera ein fyrimynd fyri onnur. Uttan tykkum hevði hetta ongantíð verið veruleiki, segði Rósa Samuelsen.

Hon hevur sett seg inn í arbeiðsháttt og annað fyri sambýlið.

- Eg havi havt høvið at lesa visjónina fyri heimi, sum tekur støði í fólkunum sum búgva her, tá talan er um arbeiðsháttt, pedagogikk og politikk hjá starvsfólkunum, segði Rósa Samuelsen.

Og tað, at umvælingin ikki var liðug, áðrenn fólkini fluttu inn, er heldur eingin vansi, kanska tvørtur ímóti.

- Eg havi hug at siga, at øll, sum fara undir slíkt sosialt arbeiðið skuldu verið koyrd í eitt óliðugt hús fyrstu mánaðirnar. Tað blivu tit. Og hygg góða úrslitið, segði Rósa Samuelsen.

Landsstýriskvinnan helt seg heldur ikki aftur við at rósa starvsfólkunum

- Nærløgd sum tit eru, so brúktu tit fyrstu tíðina í øllum byggirótinum at spekulera og at leggja ætlanir. Út í æsir. Tað eru slíkar eldsálir sum tykkum, sum styrkja meg í trúnni, at tað ber til. Tí er mín uppgáva eisini at syrgja fyri, at tit ikki brenna út, men alla tíð verða eggjaði at halda fram, segði Rósa Samuelsen.

Hon nýtti sjálvandi høvið at ynskja øllum tillukku.

- Eg vil eisini ynskja tykkum avvarandi hjartaliga tillukku við hesum heimi, tað er umráðandi at tit eru aktiv við á síðulinjuni, og ikki bara tit, men øll sum á ein ella annan hátt eru ein samstarvspartur, segði Rósa Samuelsen.